## Norðoyatunnilin

# Sama gjald sum í Vága-tunlinum

**Tað fer at kosta tað sama at koyra ígjøgnum Norðoyatunnilin, sum tað kostar at koyra gjøgnum Vágatunnilin. Kubbarnir kunnu eisini brúkast í báðum tunlunum**

TUNNILSPRÍSUR
*Snorri Brend*

Nevndin í p/f Norðoyatunlinum hevur ásett prísin fyri at ferðast gjøgnum Norðoyatunnilin, og er hesin settur til at vera tann sami, sum nú er galdandi fyri at ferðast gjøgnum Vágatunnilin, eins og somu avsláttarmøguleikar vera.

Árið 2006 er royndartíð og støða verður av nýggjum tikin til nýtslugjaldið um ársskiftið 2006/2007.

Avtala er gjørd millum p/f Norðoyatunnilin og p/f Vágatunnilin, soleiðis at tann, ið hevur hald hjá øðrum felagnum, kann ferðast gjøgnum hin tunnilin við sama kubba og sama avsláttri. Tó er árshald einans galdandi fyri hvønn tunnilin sær.


*Norðoyatunnilin letur upp um stutta tíð, og nú er avgjørt hvør prísurin verður at koyra ígjøgnum hann*

### Somu prísir

Prísurin fyri at ferðast gjøgnum Norðoyatunnilin verður sostatt hesin:

- Fyri lætta ferðslu er kostnaðurin fyri staka ferð 170 kr t/r
- Fyri bilar millum 6 og 12,5 m er gjaldið 670 kr/t/r, og fyri bilar oman fyri 12,5 m er gjaldið 1.000 kr t/r.
- Fyri lættar bilar er møguligt at tekna eitt árshald, sum loyvir óavmarkaða koyring. Haldið verður teknað fyri eitt ár í senn, og er treytað av, at avtala er gjørd um, at goldið verður mánaðarliga forút við GS-avtalu. Kostnaðurin er 1000 kr/mánaðin ella 12.000 kr/ár.

---

# Borgarstjórin: Vónbrotin av tunnils-prísum

**Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík sigur við Norðlýsið, at hann er sera vónbrotin um prísásetingina hjá Norðoyatunnlinum**

TUNNIL
*Snorri Brend*

**Politikkarin:** - Eg havi ikki kanna prísirnar nærri men sum eg skilji so liggja teir á sama støði sum teir í Vágatunnlinum, og tað skuffar meg.

Sambært blaðnum hevði hann væntað, at tað fór at verða býligari at koyra gjøgnum Norðoyatunnilin, enn tað er at koyra ígjøgnum Vágatunnilin, serliga tá hugsað verður um tann tunga flutningin sum verður her norðuri.

- Men sum eg skilji, so eru prísirnir bert galdandi í eitt ár. Hesa tíðina fær nevndin fyri tunnilin tí eitt betri grundarlag fyri at áseta nýggjar prísir.

Tá vænti eg at teir verða lækkaðir, sigur Steinbjørn O. Jacobsen.


*- Eg hevði væntað lægri prísir, sigur borgarstjórin í Klaksvík*

# JFK-stjórin: Koyringin eigur at vera ókeypis

**Fyrr í vikuni varð boðað frá, at tað fer at kosta tað sama at koyra ígjøgnum Norðoyatunnilin, sum tað í dag kostar at koyra gjøgnum Vágatunnilin.**

TUNNIL
*Snorri Brend*

**Fiskurin:** Vinnulívið í Klaksvík hevur leingi bíðað eftir tíðindunum um, hvat tað fór at kosta at koyra gjøgnum Norðoyatunnilin sum letur upp seinni í vár.

Nú varð so umsíðir kunngjørt, at tað fer at kosta 170 kr. fyri lætta ferðslu. Fyri vinnulívið hevði tað helst størri týdning, hvat kostnaðurin varð fyri tey størru akførini.

Her varð avgjørt, at fyri bilar millum 6 og 12,5 m er gjaldið 670 kr., og fyri bilar oman fyri 12,5 m er gjaldið 1.000 kr. t/r.

Út frá hesum ber nú til hjá vinnulívi og fyritøkum í Klaksvík og Norðoyggjum at leggja útreiðslustøðið fyri komandi ár.


*Hanus Hansen: - Tað skal vera ókeypis*

### Púra samdir

Men tað eru kortini ikki øll, sum eru eins fegin um prísirnarinnan samferðsluøkið – ella rættari sagt: prísir í heila tyki. Teirra millum er formaðurin í fólkaflokkinum, Anfinn Kallsberg, sum hevur borið upp á mál, at tað um nøkur ár eigur at verða púra ókeypis at nýta tað føroyska samferðslukervið.

Hesum sama er ein annar norðoyingur, stjórin í JFK eisini samdur við Anfinni í. Tá Sosialurin bað Hanus Hansen um eina viðmerking til prísirnar, var stutta viðmerking hansara:

- Eg eri púra samdur við Annfinni. Tað eigur at vera ókeypis, sigur hann.

Sjálvur fegnast hann um henda nýggja møguleikan sum norðoyingar fáa at sleppa til meginlandið.

- Tað verður heilt fantastiskt at kunna koyra allan vegin gjøgnum ein tunnil, sigur Hanus Hansen.